# Tvífalda framleiðsluna

*Smoltstøðin Vestsmolt á Viðareiði er bygd út fyri knappar 20 milliónir. Eftir útbyggingina verður framleiðslan væntandi tvífaldað*

Edvard Joensen



*Smoltstøðin Vestsmolt á Dalabakka er bygd út fyri knappar 20 milliónir krónur*

**Mynd: Edvard Joensen**

**Á Dalabakka:** Stóra útbyggingin á Vestsmolt hevur sum so tvey endamál. At kunna seta smolt javnari út alt árið og at tvífalda smoltframleiðsluna.

Smoltstøðin Vestsmolt á Dalabakka Inni í Dølum á Viðareiði er løgd undir tak. At byrja við var ein høll, meðan tær nú eru fýra, sigur Jákup Mourits Heinesen, sum er leiðarin á støðini.

Eisini eru gomlu kørini skift út við heilt stór kør. Fiskatalið er í løtuni tvær milliónir, men tá nú alt fer í gongd við fullari kraft, verður talið tvífaldað til fýra milliónir, sigur hann.

Eisini hevur Vestsmolt fingið biofilturannlegg til at kalla alla framleiðsluna.

Tó er tað so, sigur Jákup Mourits Heinesen, at yngulið, sum teir startfóðra, ikki hevur biofiltur annlegg. Tað er annlegg, sum reinsar og endurnýtir vatnið. Til yngulið verður vatnið bara brúkt einaferð. Vatnið verður tó sóttreinsað, áðrenn tað kemur í kørini, sigur hann.

Eitt av málunum við útbyggingini er, at tað skal bera til at seta fisk út alt árið. Tað verður stýrt soleiðis, at ljós og hiti í kørunum verða ásett av støðini.

At støðin hevur biofilturannlegg ger, at ikki er neyðugt at vera so bundin av, um turkur skuldi verið.

Tað er ikki tí, sigur Jákup Mourits Heinesen. Tað hevur ongantíð bilað við vatni hjá teimum. Heldur ikki í summar, sum annars var sera turt. So hann væntar ikki trupulleikar tann vegin, sigur hann.

Vestsmolt fær rogn frá Fiskaaling og Fútakletti. Og smoltið, sum latið verður av aftur støðini, fer alt til alibrúkini hjá Vestlaks. Tað er eisini Vestlaks, sum eigur smoltstøðina Vestsmolt.

Avskipingin gongur sera lættliga ídag í mun til, hvussu var fyrr, sigur Jákup Mourits Heinesen. Fyrr varð smoltið sent í kørum við lastbilum inn í Hvannasund, haðani tað so varð siglt við brunnbátum til aliringarnar.

Í dag er tað soleiðis, at brunnbáturin kemur at klettinum niðan fyri smoltstøðina, og so verður fiskurin pumpaður gjøgnum slangur umborð. Báturin leggur tó ikki heilt at, men liggur og andøvir við slangunum spentum ímillum.

Við gomlu skipanini tók tað ein heilan dag at avskipa 100.000 smolt, sigur Jákup Mourits Heinesen. Í dag tekur tað bara einar tveir tímar. Og tað doyr nógv minni undir flutninginum nú, enn tað gjørdi, tá flutt var upp á gamlan máta.

Útbyggingin byrjaði so smátt fyri einum fýra árum síðan og er nú við at vera liðug, sigur Jákup Mourits Heinesen. Enn manglar biofilturannleggið at verða sett til ein lítlan part av støðini. Umframt skal hampast og fríðkast rundan um hallirnar. So er útbyggingin liðug á hesum sinni.

# Oljuráðstevna í Norðurlandahúsinum

Jan Müller

**Tórshavn:** Týsdagin og mikudagin 24. og 25. oktober verður Norðurlandahúsið karmurin um eina stóra oljuráðstevnu um framtíðar leiklutin hjá føroyska samfelagnum í komandi oljutilgongdini. Á ráðstevnuni verða umboð fyri føroyskt vinnulív og myndugleikar og stovnar umframt umboð fyri útlendska oljuvinnu. Tað eru Vinnuhúsið og Stefansons Hús, sum skipa fyri tiltakinum. Umframt ráðstevnuna verður eisini sokallað »Workshop«, har einstøk feløg hava møguliga at sýna fram og gera vart við seg.

Evnið fyri ráðstevnuna er „The exploration phase: How the licensees will secure genuine Faroese participation.“ Tvs. hvussu loyvishavararnir vilja tryggja veruliga føroyska luttøku í leitingarskeiðinum.

Umboð fyri allar operatørarnar í 1. útbjóðing verða við á ráðstevnuni og fara at leggja fram tilfar og leggja upp til orðaskifti. Evnini verða fjølbroytt. Á skránni er m.a. logistikkur, infrastrukturur, lokalsamfelgið, ídnaðurin, sáttmálaviðurskifti oma.

Eisini fleiri føroyingar fara at halda fyrilestrar. Millum teirra eru oljumálaráðharrin, stjórin í Oljumálastýrinum, stjórin í Atlantsflog, stjórin í Vinnuhúsinum, stjórin fyri TK-stovuna o.a.

Umboðini fyri útlendsku oljufeløgini, ið fara at røða, verða m.a. Bob Ferris frá Amerda Hess, John Inderhaug frá Statoil, Martin Miles frá BP og Ron Landsdell frá Agip.

(Í sambandi við stóra tiltakið gevur Sosialurin út eitt temablað um føroyska samfelagið og komandi oljuvinnu. Tilfar og lýsingar til hetta blaðið skulu verða Sosialinum í hendi í seinasta lagi fyrst í komandi viku. Blaðm.)

Tey, sum vilja vita meira um ráðstevuna, kunnu fara inn á www.offshore.fo á internetinum. Freistin at tekna luttøku er 9. oktober.






# Fiskimenn við høgari inntøku skulu nú betala meiri í skatti

*Skattafrádrátturin til fiskimenn skal nú avmarkast. Ætlanin er at peningurin, sum kemur meiri í landskassan, skal koma teimum lágu inntøkunum til góðar, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri*

Áki Bertholdsen

Fiskimenn, sum hava høgar inntøkur, skulu nú betala meiri í skatti.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fígjgarmálum, sigur, at ætlanin er broytingin skal koma í gildi nú á nýggjárinum.

Hann sigur, at tað ætlar hann at gera við at avmarka tann serliga skattafrádráttin, sum fiskimenn fingu fyri nøkrum fáum árum síðani.

Tá samstykti løgtingið at fiskimenn skulu fáa ein serligan skattafrádrátt upp á 15% av inntøkuni.

Orsøkin til, at hetta var neyðugt, var, at lond, rundanum okkum, geva fiskimonnum serligar skattasømdir.

Tað varð ført fram, at tað ber í sær, at føroyskir fiskimenn støðast ikki í føroyska fiskiflotanum, men rýma í onnur lond at arbeiða og búgva.

Nógvir eru longu farnir, og fingu fiskimenn í Føroyum ikki skattasømdir, fóru fleiri at rýma afturat.



*Teir fiskimenn sum hava meiri enn 500.000 í inntøku, skulu nú betala meiri í skatti fyri at onnur, sum hava lága inntøku, kunnu fáa ein lætta. Myndin er tilvildarlig*

Men fingu okkara fiskimenn ein serligan skattafrádrátt, fór tað at forða fyri at fleiri fiskimenn fluttu.

Og hartil fór tað at eggja teimum, sum eru rýmdir, at flyta heimaftur at búgva, hóast teir annars fiskaðu við útlendskum skipi.

Sostatt skuldi tað ført til, at meiri skattur kom í landskassan, hóast skatturin varð lækkaður.

## Frá 1. januar

Men nú uppskot til fíggjarlóg fyri 2001, varð løgd fyri tingið herfyri, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at ætlar at avmarka hendan serliga 15% skattafrádráttin hjá fiskimonnum.

Ætlanin er, at hesin frádrátturin hereftir bara skal umfata inntøkur upp til 500.000 krónur.

Í løtuni kunnu fiskimenn annars draga 15% av inntøkuni frá, áðrenn hon verður skattað, sama, hvussu høg inntøkan er.

Men nú ætlar Karsten Hansen, at 15% kunnu bara dragast frá inntøku upp til 500.000 krónur, meðan fullur skattur verður goldin av tí partinum av inntøkuni, sum er yvir 500.000 krónur.

Karsten Hansen sigur, at tá ið hesin serligi skattafrádrátturin kom, var tað ætlanin, at hann bara skuldi fevna um inntøkur undir 500.000 krónur, meðan fullur skattur skuldi betalast av tí partinum av inntøkuni, sum er yvir 500.000 krónur.

–Men tekniskir trpulleikar gjørdi, at ætlanin at seta hesa avmarkingina í verk, varð slept tá.

– Ístaðin varð tað sett í lógina, at landsstýrismaðurin í fíggjarálum fekk heimild til, við kunngerð, at avmarka skattafrádráttin, til bara at umfata inntøkur undir 500.0000.

Sostatt er tað ikki neyðugt at leggja málið fyri tingið, tí landsstýrimaðurin hevur heimild til at gera tað sjálvur.

– Nú er ikki longur nakar tekniskur trupulleiki at fáa hetta upp í telduskipanina og tað er so ætlanin at gera tað nú, so at broytingin fær gildi frá 1. januar 2001 at rokna, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at orsøkin til hesa broytingina, er, at inntøkur, sum eru omanfyri 500.000 krónur, hava ikki brúk fyri skattalætta.

– Tá ið ein fiskimaður hevur forvunnið 500.000 krónur, hevur hann eisini fingið ein skattafrádrátt uppá 75.000 krónur.

– Og tá haldi eg at tað er rímiligt, at hann betalir skatt, sum øll onnur, av tí, sum er útyvir tað.

Hann sigur, at tað verður ikki nógv, sum landskassin fer at fáa meiri inn í skatti av hesi orsøk.

Men peningurin, sum kemur inn, er ætlanin at brúka til onkusvegna at lætta um hjá teimum, sum hava tær lægstu inntøkurnar.

Hvussu tað skal gerast, er ikki avgjørt enn.

# Gera nýggja kanningarstovu

*Nýggj fiskapatalogisk kanningarstova skal gerast á Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, og eftirlitsdeildirnar skulu flytast í onnur høli*

Eyðun Klakstein

Komandi ár verður farið undir at gera eina nýggja kanningarstovu á Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, og partur av virkseminum hjá starvsstovuni skal flytast úr húsunum á Debesartrøð.

Arbeiðið at gera nýggju kanningarstovuna og flyta virksemi verður mett at kosta 13 milliónir, og á fíggjarlógini komandi ár skulu 6,5 milliónir setast av. Seinna helvtin skal eftir ætlan á fíggjarlógina í 2002.

Av tí at sjúkufyribyrging skal setast í verk innan alivinnuna, verður neyðugt at gera eina fiskapatalogiska kanningarstovu á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Ætlanin er at umbyggja og víðka miðhæddina í starvsstovuhúsunum á Debesartrøð til bert at umfata kanningarstovur. Starvsstovuvirksemið, sum er knýtt at kanningarstovunum – til dømis skrivstovur til starvsfolk, sum arbeiða á kanningarstovunum – verður flutt upp á aðru hædd í starvsstovuhúsinum á Debesartrøð.

## Dagføring

Hetta merkir, at eftirlitsdeildirnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovu, sum higartil hava húsast á aðru hædd í starvsstovuhúsinum, flyta í onnur høli aðrastaðni í høvustaðnum.

Endalig projektering av umbyggingini av miðhæddini í starvsstovuhúsinum er ikki liðug enn.

Í samband við umbyggingina ella víðkanina, verður øll kanningarstovan, sum vit kenna hana í dag, dagførd til at lúka øll galdandi krøv – herundir verður nýggj ventilatióinsskipan gjørd og nýtt tak lagt á starvsstovuhúsið.

Eftir umbyggingina verður effektiva starvsstovuvíddin umleið 400 fermetrar, meðan gangir, toilett, goymslur og skrivstovur til starvsfólkið verður umleið 600 fermetrar tilsamans.



*Av tí at sjúkufyribyrging skal setast í verk innan alivinnuna, verður neyðugt at gera eina fiskapatalogiska kanningarstovu á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*

# Bygga tyrlupallarnar út

*Næsta tvey árini skulu stívliga tríggjar milliónir brúkast til at útbyggja tyrlupallar fyri*



*Seinastu fýra árini eru brúktar umleið fýra milliónir til at útbyggja tyrlupallarnar, og næstu tvey árini er ætlanin at brúka stívliga tríggjar milliónir afturat.*

Arbeiðið at útbyggja tyrlupallarnar í landinum heldur fram komandi ár.

Á fíggjarlógaruppskotinum fyri komandi ár eru settar 1,6 milliónir krónur av til hetta arbeiðið.

Fyri at tyrlupallarnir skulu lúka tey krøv, sum loftferðslumyndugleikarnir seta til tyrlupallar til ferðafólkaflutnings, hevur verið neyðugt at byggja pallarnar út.

Tá ið 2001 er lokið, eru pallarnir í Svínoy, Klaksvík, Tórshavn, Mykinesi, Skúvoy, Froðba, Gásadali, Koltri og Stóru Dímun útbygdir. Pallurin í Stóru Dímun verður heilt liðugur í 2002.

Tá eru pallarnir á Kirkju og Hattarvík eftir. Men eftir ætlan skulu tey arbeiðini fara í gongd í 2002.

Seinastu fýra árini eru brúktar umleið fýra milliónir til at útbyggja tyrlupallarnar, og næstu tvey árini er ætlanin at brúka stívliga tríggjar milliónir afturat.

**ek**